Tinganes 16. mai 2023
Málnr. 23/11278

# Ráðgeving og fyriskipan av sølu av ognarluti hjá landinum í P/F Smyril-Line

Løgmaður hevur fingið heimild í høvuðskontu 2.37.6.11 í fíggjarlógini 2023 at selja partabrøvini, sum landið eigur í P/F Smyril-Line. Í hesum sambandi hevur Løgmansskrivstovan tørv á ráðgeving og fyriskipan av søluni.

## Uppgáva

Løgmansskrivstovan skal í sambandi við ognarlutin hjá landinum í P/F Smyril-Line lýsa málið fyri at útvega eitt nøktandi grundarlag til at gera av, hvør loysn er hin búskaparliga og fakliga mest skynsama í einari møguligari sølu av ognarlutinum í felagnum. At stuðla undir lýsingini bjóðar Løgmansskrivstovan hesar uppgávur út:

1. Gera virðismeting av P/F Smyril-Line og greiða frá fyritreytum, serligum viðurskiftum v.m.
2. Meta um møguleikar at selja ognarlutin, nær best er at selja og kortleggja møguligar keyparar
3. Meta um eina minstu upphædd fyri sølupris
4. Gera sølutilfar, skipa útboð og tryggja eina væleydnaða sølutilgongd
5. Samskifta við møguligar keyparar, fyriskipa sølufundir o.tíl.
6. Fyriskipa samráðingar við møguligar keyparar
7. Gera tilmæli um sølu, treytir o.a.
8. Fyrireika søluavtalu

## Stutt um P/F Smyril-Line

Høvuðsvirksemið hjá Smyril Line er at reka ferðamanna- og farmavirksemi, sum fevnir um ferðamanna- og farmaflutning, hurð til hurð flutningsloysnir, ferðamannavistir og annað líknandi virksemi. Felagið eigur og rekur skip og fastogn, umframt ognarpartar í øðrum feløgum. Landið eigur 16,238% av partapeninginum.

## Tíðarkarmur og tilfar

Ráðgevingararbeiðið skal byrja skjótast gjørligt. Tí verður sett sum krav, at veitarin hevur neyðuga orku til taks.

Tøkt tilfar eru ársfrásagnir og onnur almenn skjøl.

## Krøv og upplýsingar annars

Løgmansskrivstovan ynskir, at ráðgevin í ella saman við tilboðnum gevur eina greiða lýsing av, hvussu ætlanin er at skipa arbeiðið. Tilfar, sum verður framleitt, skal vera á føroyskum, donskum ella enskum. Ynski er um, at tíðarætlanir verða gjørdar fyri nær og hvussu einstøku stigini í tilgongdini verða framd í verki.

Veitarin skal gera uppskot um, hvussu uppgávan kann býtast í smærri partar, soleiðis at Løgmansskrivstovan fær eitt yvirlit yvir, nær ymisku partarnir skulu vera lidnir.  Uppskotið skal somuleiðis brúkast sum gjaldsætlan.

Tilboð skulu latast sum fastur prísur uttan mvg.  Um møgulig útlegg koma afturat upphæddini, skal tilskilast, hvørji útlegg talan kann vera um og væntaðar upphæddir.

## Minstukrøv til veitarar, ið vilja geva tilboð

Talan er um sera týdningarmikið arbeiði, og tí setir Løgmansskrivstovan faklig krøv til veitarar, sum vilja geva tilboð.  Minstukrøvini til veitarar eru, at teir hava:

- Førleikar og royndir í at virðismeta fyritøkur, undir hesum roknskaparligar førleikar
- Førleikar og royndir í at fyriskipa sølu av fyritøkum
- Førleika og royndir at veita løgfrøðiliga ráðgeving og løgfrøðiliga tænastu í sambandi við søluna

Veitarar kunnu eisini tryggja, at partur av uppgávuni verður veittur av samstarvsfeløgum.

Veitarar, ið lata inn tilboð, skulu lata Løgmansskrivstovuni yvirlit yvir teir persónar, sum ráðgevin ynskir at knýta at uppgávuni umframt skjøl og tilvísingar, ið prógva, at teir lúka nevndu krøv.

Lýkur veitarin ikki minstukrøvini, verður tilboðið ikki viðgjørt.

## Vekt og val av tilboðsgeva

Niðurstøða og avgerð um tilboð verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum nevnd eru í hesum skrivi. Um mett verður, at innkomnu tilboðini ikki lúka ásett krøv, tilskilar Løgmansskrivstovan sær rætt til ikki at velja nakað av innkomnu tilboðunum.

Tilboðini verða vektað soleiðis:

| Krav | Vekt | Partar av metingini |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | 50% | |
| Tilgongd, førleiki o.a. | 50% | • Lýsing av sølutilgongdini<br>• Lýsing av arbeiðsskipan og amboðum<br>• Tíðarætlan og meting av starvsfólkaorku<br>• Royndir við sølu av fyritøkum o.tíl.<br>• Tryggleiki (veitingartrygd) |

Stig verða givin fyri tveir partar (krøv), sum eru nevndir í talvuni omanfyri. Upp til 50 stig kunnu gevast fyri hvønn part.

Stigatal fyri ”samlaður kostnaður” verður roknað soleiðis, at bíligasta tilboð fær 50 stig, og hini tilboðini fáa stig í øvugtum lutfalli til 50, sum samlaður kostnaður er í mun til bíligasta tilboð.

Í mun til stigatal fyri ”tilgongd, føreika o.a.” telja tey fimm punktini, sum eru partar av metingini, øll tað sama.

## Tíðarfreistir og ábyrgd

Freistir í samband við uppgávuna eru sambært talvuni.

Ábyrgdarpersónur er Flóvin Eidesgaard, tlf. +298 271877 og teldupostur lms@lms.fo

| Dagur | Hending | Viðmerking |
|---|---|---|
| 16. mai | Útboð | Útbjóðingin verður kunngjørd á Keypsportalinum |
| 17. til 25. mai | Spurningar og svar | Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til lms@lms.fo. Viðmerk: "Smyril-Line spurningar". |
| 30. mai | Spurningar eru í seinasta lagi svaraðir | Spurningar og svar verða kunngjørd á Keypsportalinum. |
| 14. juni | Tilboð skulu vera inni | Freistin at lata tilboð inn er 14. juni kl. 16. Tilboð, ið verða móttikin eftir freistina, verða ikki viðgjørd. Tilboð skulu sendast til lms@lms.fo.<br><br>Viðmerk: "Smyril-Line tilboð". |
| 16. til 21. juni | Tilboð verða viðgjørd | Løgmansskrivstovan skilar sær rætt til at biðja tilboðsgeva um fund, áðrenn støða verður tikin. |
| 22. juni | Veitari verður valdur | Tilboðsgevarar fáa boð. |